Vikuskiftis Sosialurin





*Heimurin bíðar eftir Barrack Obama. Ein veðurlagsavtala uttan USA er einki verd og Obama verður mettur sum tann einast, sum kann savna heimsins leiðarar at taka ein avgerð, um at fáa eina skipan fyri at tálma avleiðingum av veðurlagsbroytingunum*

# COP15 - Bjargast heimurin í dag?

**Sum sagt var í fyrstu greinini um veðurlagsfundin fyri tveimun vikum síðan, so hevur COP15 verðið merkt av taktikki og nervaspæli á hægsta stigi, og nú hevur seinasta náttin verið brúkt at royna at fáa eina semju. Í morgun hava stjórnarleiðarar fingu eitt semjuuppskot, sum skal fáa heimin at samstarva um at loysa hesa stór avbjóðing, eitt semjuuppskot sum skal tryggja at hitin ikki veksur meir enn tvey hitastig og at ídnaðarlondini binda seg til ein grunn sum í 2020 veitir 100 mia. Dollarar árliga til grøna menning í triðaheimslondunum**

COP15
*Bogi Eliasen cand.scient.pol*

Vánirnar til fundin hava verið nógvar og stórar, men áhugamálini hjá luttakandi londunum hava eisini verið ymisk. Vónin hjá teimum sum halda at okkurt má gerast við veðurlagsbroytingarnar hevur verið, at felags málið saman við globalu sam- og tilvitskuni fekk hendan fundin at gerast til eina søgulig semju um alheims samstarv at loysa ein trupulleika til gagns fyri allan heimin, og har øll geva sítt íkast.

### Formansskapurin dumpaði

Tað er lítl ivi um at danska samráðingarleiðslan ikki megnaði sína uppgávu til fulnar. Afturat eru ábendingar um, at klandrið millum Forsætismálaráðið og Umhvørvismálaráðið elvdi til at Connie Hedegaard bleiv sett frá og sett aftur í sessin sum forseti fyri COP15. Síðan hava vit sæð, at stóru og týdningarmestu londini samráðast uttanum COP 15 formannskapin. Fundin í nátt millum umleið 25 lond hevur Sarkozy tikið stig til og Baroso hevur stuðlað. Fyrimunurin fyri Connie Hedegaard kann tó verða, at hon um fáar dagar umboðar ES á veðurlagsøkinum, og tí kann setast í samband við ES lyftir.

### Stuðul

Størsta ósemjan er helst peningaparturin av veðurlagspakkanum, nevniliga stuðulin frá ídnaðarlondunum til menningarlondini. ES kom beinavegin við eitt útspæli um stuðul áfram til 2012, altso restina av Kyotosáttmálaskeiðnum, sokallaði stuttskygdaða stuðulsmodellið.

### USA

Í gjár legði amerikanski uttanríkisráðharrin Hillary Clinton fram eitt uppskot um ein grunn, figgjaðan við 100 mia dolllarar árliga til í 2020 frá fyrsta heiminum til triðja heimin, sum skal verða langskygdaða loysnin. Tað byrjar at líkjast eini upphædd sum partarnir kunnu liva við, hóast hetta er nógv minni enn G77 londini hava kravt. Men hvør skal koma við pengunum, hvussu hesir pengar skulu brúkast og hvør skal býta pengarnar út er tað stór ósemja um. Tað er eingin ivi um, at talan her er um so stórar upphæddir, at tað gevur vald at kunna stýra hesum pengum. Tí er hetta eisini ein staðfesting av, at veðurlagsavtalan skal síggjast sum ein partur av tilgongdini at finna nýggju valdsjavnvágina í heiminum. Hetta er ein samrunnin partur av at hava eina nýggja alheims búskaparskipan, sum ikki minni enn tveir G20 fundir hava sett á ovastu altjóða politisku dagsskrá.



*Wen Jibao, kinverski forsætismálaráðharrin hevur avgerðandi ávirkan á hvussu søguliga stór dagsins veðurlagsavtala verður. Kina hevur bæði heimsins størsta útlat og nógvar milliónir fólk í djúpasta fátækratdømi*

### Nýggir vinnukarmar

Avtalan, sum skal koma á veðurlagsøkinum frá 2012, fer at hava ávirkan á vinnukarmar. Talan er m.a. um tálman av útláti, um keyp og sølu av útlátskvotum, um altjóða eftirlit við útláti inni í londum, um stuðul til menning av grønari vinnu í menningarlondum og, sum sagt, valdið á einum stórum altjóða pengatanga, sum hevur valdið at stýra hvørji lond og hvat slag av grønari vinnu skal mennast í menningarlondunum, og tryggja at pengarnir verða rætt nýttir. Eisini skal avtalan finna ein lykil til krøvini, ið setast skulu til ávíkavist ídnaðarlond og menningarlond og ikki minst verða soleiðis, at vinnugeirar kunnu liva við treytunum, sum settar verða.

### Kina og USA avgerða

Sum flestu mettu undan fundinum, so eru tað serliga Kina og USA sum skulu semjast. Burtursæð frá nervarspælinum um hvat av londunum skal fáa bestu relativu karmar í hesi avtalu, so er talan um tvey lond, ið hava serliga trupult at góðtaka altjóða eftirlit av egnum landi.

Ídnaðarlondini hava stutskygt eisini tann trupulleikan, at tey mitt í eini kreppután skulu binda seg at brúka pengar til menning av triðjaheiminum . Tað kann skjótt skapa ónøgd og politiskar tvørleikar at seta semjuna í verk. Men júst hesin trupulleikin er partvís fluttur langt fram við at tosað um 2020 til at fáa fulla upphædd í grunnin, og at arbeiða við eini upphædd sum øll ídnaðarlondini uttan trupulleikar megna restina av Kyoto sáttmálaskeiðnum. Seinastu søgurnar seint fyrrapart benda á, at tað verður ein vánalig avtala uttan nøkur klár mál, sum er eitt stórt vónbrot.

Men var tað nakar sum ivaðist í, at Kina hevur fingið ein sera týdningarmiklan leiklut í heiminum, so hava tey nú fingið sjón fyri søgn.